# Javnvigar alt vegakervið

ØKISMENNING
*Tummas í Dali*

- *Nú skal vera liðugt at spæla gekk við sjóvegis farleiðunum*
- *Vinnumálaráðið skal kanna og vísa á fleiri møguligar samhaldsfastar skipanir fyri alt vegakervið í landinum, sum løgtingið síðan tekur til viðgerðar*
- *Sjóvegis farleiðirnar mugu viðurkennast sum samfelagslig neyðsynjarmál*
- *Útjaðarin má ikki góðtaka hægri ferða- og flutningskostnað, sigur Marjus Dam*

**– Men bæði stórar príshækkingar og skert túratal eru væntandi seinni í hesum fíggjarárinum, serliga á leiðini um Suðuroyarfjørð!**
**- soleiðis sum støðan er í løtuni**

Marjus Dam, løgtingsmaður fyri Sambandsfl., leggur uppskot til samtyktar fyri løgtingið, sum miðar fram móti eini samhaldsfastari skipan á øllum vegakervinum í landinum.

Uppskotið varð latið løgtingsskrivstovuni í gjár, og væntast kann, at tað verður viðgjørt í tinginum í hesari vikuni, antin hósdagin ella fríggjadagin.

Sambært uppskotinum fer Føroya løgting at heita á landsstýrismannin í vinnumálum um at gera eina kanning, sum hevur til endamáls at gera samferðslukervið ímillum oyggjarnar samhaldsfast.

### Spæla ikki gekk við farleiðum

- Nú má vera liðugt at spæla gekk við farleiðunum til økini í útjaðaranum, sigur Marjus Dam.

- Vit hava í seinastu verið vitni til eina mannminkandi viðgerð av útjaðaranum, har myndugleikarnir hava arbeitt við príshækkingum millum 7 og 20 prosent á sjóvegisfarleiðunum, ja við enntá heili 33 prosentum á farleiðini um Suðuroyarfjørð.

- Hetta hendir, samstundis sum samgongan tosar um ein skattalætta uppá nøkur fá prosent ! – Tað merkir, at skattalættin er treytaður av, hvar í landinum tú býr, ella sagt øðrvísi: tað verða fólk í útjaðaranum, sum skulu gjalda skattalættan fyri hini, samstundis sum teimum verður álagdur ein eykaskattur, sigur Marjus Dam.

- Hetta man koma flestu veljarum púra óvæntað, tí hesi tiltøk mugu metast at stríða ímóti øllum tí, sum hendan samgongan og tann frá 98 hava sagt seg arbeiða fyri í sínum økismenningarpolitikki.

### Onki eljustríð millum økini

Marjus Dam førir fram, at hansara uppskot til samtyktar verður lagt fram, tí onki hevur higartil verið gjørt fyri at kanna hesi viðurskifti, hóast lyfti vórðu givin í 2000 um, at allur prísbygnaðurin hjá Strandafaraskipum Landsins skuldi endurskoðast.

- Tíðin er nú komin, at samhaldsfasta landsvegakervið verður víðkað soleiðis, at útjaðarin eisini kann fáa gagn av hesi góðu skipan, sum meginøkið alla tíð hevur havt, sigur Marjus Dam.

- Farleiðir um firðir og sund skulu nú eisini undir somu skipan sum landsvegakervið.

### Breiða politiska semju

Samferðslan er eitt so grundleggjandi mál fyri alt Føroya fólk, at her skuldi ikki verið neyðugt við partapolitiskum spæli.

- Tað snýr seg ikki um samband og fullveldi, og ringt er eisini at síggja nakað hugmyndaligt stríð millum vinstra og høgra í hesum máli.

- Málið snýr seg um at viðurkenna allar farleiðirnar í landinum sum samfelagslig neyðsynjarmál, um borgararættindi, um ikki at hava skipanir, sum gera mismun á økjum.

- Tí skuldi tað verið eitt kærkomið høvi hjá samgonguni at fingið eina breiða politiska semju um hetta mál, har alt tingið samdist um eina virðiliga loysn - eina loysn, sum eisini andstøðan bant seg til at vilja fremja.

- Tí vit mugu koma burturúr hesum mannminkandi eljustríðnum fleiri ferðir um árið um ávísar farleiðir til útjaðaran.

- Tí, vit vita øll, at verandi skipan á samferðsluøkinum er órættvís og harafturat samfelagsliga skaðilig við teimum gjaldsmúrum, sum ávís øki í útjaðaranum dagliga renna seg í, sigur Marjus Dam.

### Kappingaravlagandi eykaskattur

Á fíggjarlógini fyri 2003 verður inntøkan hjá Strandfaraskipum Landsins mett at verða 43,6 mió. krónur í sambandi við Oyggjaleiðirnar – t.v.s. fyri sjóvegis farleiðirnar.

- Henda inntøka hjá Strandfaraskipum Landsins er nett tað sama sum útreiðslurnar hjá vinnulívinum og einstaklingum í útjaðaranum fyri at nýta almennu Oyggjaleiðirnar, og sum tey jú eru tvingað til at nýta.

- Hetta merkir, at útjaðarin tey seinastu tíggju árini hevur goldið ein eykaskatt, sum svarar til o.u. hálva milliard, sigur Marjus Dam.

- Sjálvandi merkis hetta væl hjá bæði vinnulívi, skúlum, frítíðarfeløgum og einstaklingum í útjaðaranum, sigur Marjus Dam.

- Vinnulívið er tvingað at virka um miðstaðarøkið, skúlarnir somuleiðis, m.a. í sambandi við námsferðir, eins og tann einstaki borgarin, sum ikki sleppur undan at ferðast til miðstaðarøkið m.a. í sambandi við sjúkrahúsverkið og ymiskar almennar tænastur, eitt nú av mentanarligum slag.

- Í roynd og veru eru gjøldini, sum eru løgd á Oyggjaleiðirnar og undirsjóvartunnilin undir Vestmannasund, ikki annað enn ein eykaskattur, sum í verki bert er lagdur á nakrar borgarar í samfelagnum, nevniliga borgararnar í útjaðaranum.

- Hesin skatturin er harafturat kappingaravlagandi, bæði fyri vinnulívið í útjaðaranum og harafturat fyri arbeiðsmegina, sum er har, sigur Marjus Dam.

### Øll skulu kenna skattalættan!

Samgongan hevur boðað frá, at skattalætti nú verður veittur í hesum árinum, men Marjus Dam sigur seg illa at duga at finna meiningina í hesum fíggjarpolitikki, av tí at skattalættin við tað sama verður kravdur inn aftur av samgonguni – og tað einans frá einum parti av fólkinum.

- Samstundis sum skattalættin verður givin, krevur landsstýrið ikki bara hægri eykaskatt inn gjøgnum Oyggjaleiðir, men tekur eisini av stuðulin til flutning av fiski - henda stuðul, sum skal javnseta framleiðslutreytirnar hjá virkjunum í útjaðaranum við tey í meginøkinum.

- Niðurstøðan kann tí ikki verða nøkur onnur enn, at tað er útjaðarin, sum skal gjalda fyri skattalættan hjá borgarunum í meginøkinum, sigur Marjus Dam.

### Enn hægri eykaskattur er á veg !

Sambandsflokkurin legði í síðstu viku fram uppskot um lóg, sum skal forða fyri, at ferðaseðlaprísirnir hjá Strandfaraskipum Landsins hækka, og sum skal virka fyri, at prísirnir á øllum sjóvegis farleiðum verða javnsettir.

Lógaruppskotið er til viðgerðar í vinnunevndini, og enn er ógreitt, nær tað kemur til 2. viðgerð í tinginum.



*Marjus Dam, tingmaður leggur uppskot fyri tingið sum skal kanna alt vegakervið í landinum við møguleika at gera samhaldsfastar skipanir*

Marjus Dam roknar í øllum førum við, at ein enn hægri skattabyrða stendur og bíðar nakrar mánaðir frammi eftir at verða løgd á fólk í útjaðaranum, tí hann metir ikki, at Strandfaraskip Landsins fara at megna at loysa málið, uttan so at okkurt grundleggjandi verður gjørt við sjálva skipanina.

- Prísskipanin er ikki til at fáa greiði á, og tað greiðasta og mest sømiliga og harafturat umsitingarliga sæð bíligasta er at taka av allan tann fløkta prísbygnaðin hjá Strandfaraskipum Landsins og gera eina samhaldsfasta skipan fyri alt landið, sigur Marjus Dam.

- Tað er nú eisini løgið, at so at siga øll fólk innan Strandfaraskip Landsins eru sett í starv í miðstaðarøkinum.

- Hóast tað er útjaðarin, sum fremst av øllum nýtir Strandferðsluna og rindar fyri hana, so fær útjaðarin ikki nøkur av ársverkunum innan hendan landsstovnin, sigur Marjus Dam.

- Tað í sær sjálvum er undrunarvert.

### Samhaldsfesti á øllum leiðum

Uppskotið hjá Marjusi Dam til samtyktar kann føra til, at vinnumálaráðið kemur við einum tilmæli, sum vísir á fleiri møguleikar fyri at gera vegakervið um alt landið samhaldsfast.

Løgtingið kann tá taka málið til sakliga viðgerð og finna eina semju á breiðum politiskum grundarlag, soleiðis at farleiðirnar í framtíðini ikki framhaldandi vera ein partapolitisk kastibløka á tingi.

Tí farleiðirnar eru ikki marglætisoyðsl, tær eru ikki at meta sum eykanýtsla hjá ávísum borgarum, men heldur eitt samfelagsligt neyðsynjarmál.

Tí er ikki haldbart í longdini at hava ymisk treytir fyri vegakervið um landið, og tí er neyðugt at finna eina haldgóða loysn, sum javnsetir vinnulívið og allar borgarar í landinum.

Tað ber ikki til í longdini - eftir at fyrst at hava miðsavnað alt alment virksemið í miðstaðarøkinum - at seta í verk, varðveita og enntá støðugt hækka gjaldsmúrarnar, sum útjaðarin dagliga rennur seg í.



*Sjóvegis farleiðirnar mugu viðurkennast sum samfelagslig neyðsynjarmál*



# Føroyingar fáa ábyrgd av fjølmiðlum

**Landsstýrið og danska stjórnin eru komin ásamt um, at fjølmiðlaábyrgd verður yvirtikin sum føroyskt málsøki. Sostatt verður forðingin fyri, at ein føroysk lóg kann gerast um góðan fjølmiðlasið, fingið av vegnum**

PRESSAN
*Ingi Rasmussen*



*Høgni Hoydal landsstýrismaður og Rúni Joensen aðalstjóri í løgmálaráðnum við avtaluni um at yvirtaka fjølmiðlaábyrgd*

Fjølmiðlaábyrgd hevur fingið nógva umrøðu í síðstuni. Føroysku fjølmiðlarnir standa javnan fyri skotum, men borgarin hevur onga staðni at venda sær, um hann ætlar sær at kæra.

Hetta hevur eisini fingið løgtingsins umboðsmann at finnast at myndugleikunum fyri at ikki at fáa málið í rættlag, so ein lóg um góðan fjølmiðlasið fæst í lag. Sambandsflokkurin hevur eisini júst lagt uppskot fyri løgtingið, sum hevur til endamáls at seta donsku lógina í gildi.

Málsøkið fjølmiðlaábyrgd er danskt, og hetta var orsøkin til, at Høgni Hoydal landsstýrismaður mátti taka eitt lógaruppskot aftur, sum hann legði fyri løgtingið í mars 2001.

Næstu ferð fer helst at ganga betur. Á fundi í Keypmannahavn mánadagin, samdust Høgni Hoydal landsstýrismaður og Lene Espersen løgmálaráðharri um at fáa ábyrgdina av fjølmiðlunum á føroyskar hendur.

Landsstýrið hevur skotið upp, at málsøkið verður yvirtikið við eini vanligari avtalu millum stjórnina og landsstýrið. Men danska stjórnin vil hava málið til viðgerðar í Fólkatinginum og miðar eftir, at málið er avgreitt í hesum árinum.

Samstundis ger landsstýrið lógaruppskot til fjølmiðlaábyrgd og sendir lógina til hoyringar hjá politisku flokkunum.

– Vit høvdu ynskt okkum, at hetta málið langt síðan varð avgreitt og halda ikki, at neyðugt er hjá stjórnini at fara í Fólkatingið. Men eg eri kortini fegin um, at ein avtala nú er gjørd um at fáa hetta málsøkið á føroyskar hendur. Hetta málið varð reist í Landsstýrinum fyrstu ferð í 1977, so tað er sanniliga upp á tíðina, at føroyskir myndugleikar taka ábyrgdina av eini tíðarhóskandi fjølmiðlalóggávu. Tað fer at koma bæði almenninginum og føroysku fjølmiðlunum til gagns, úttalar Høgni Hoydal, landsstýrismaður í einum tíðindaskrivi.

Ein fjølmiðlarábyrgdarlóg ásetir millum annað, at ein nevnd skal setast við umboðum fyri fjølmiðlar og almenning. Borgarin kann kæra fjølmiðlamál til nevndina, og nevndin hevur rætt at átala handfaringina hjá pressuni av ymiskum málum.

Í sambandi við vitjanina í Danmark bjóðaði Høgni Hoydal danska løgmálaráðharranum til Føroya, men einki er upplýst um, hvørt Lene Espersen ætlar sær á føroyavitjan.

# Fólkaflokkurin stuðlar Fogh og Bush

**Leiðandi stjórnarflokkurin í Føroyum, Fólkaflokkurin, hevur sent danska forsætisráðharranum skriv, har hann gevur til kennar, at hann stuðlar Danmark og USA í hørðu kósini móti Irak**

KRÍGSHÓTTAN
*Ingi Rasmussen*

Í Danmark eru mótmælini farin at runga, nú Anders Fogh Rasmussen forsætisráðharri hevur sent amerikanska forsetanum skriv, har hann sigur stjórnina stuðla hansara avgjørda politikki ímóti Irak og Saddam Hussain. Ein politikkur, sum kann føra til, at USA loypir á Irak.

Í Føroyum var mótmælisgonga um vikuskiftið, har funnist var at danska politikkinum og einum amerikanskum álopi á Irak. Men tað eru eisini røddir í Føroyum, sum stuðla Anders Fogh Rasmussen.

Óli Breckmann, formaður í tingbólki Fólkafloksins, hevur hann vegna tingmanning og landsstýrismenn hjá Fólkaflokkinum, tað vil siga eisini Føroya løgmann, sent eitt stuðulsskriv til danska forsætirsráðharran.

Í skrivinum til forsætisráðharran, ið er dagfest 3. februar 2003, sigur Óli Breckmann soleiðis:

»Folkeflokken ønsker hermed at tilstede den støtte, som De på vegne af Danmarks regering sammen med andre europæiske statsledere har givet Præsident Bush og den amerikanske regering i dens faste og ansvarlige holdning over for den trussel, Saddam Hussain og hans regime udgør imod fred, demokrati, trosfrihed og menneskeværd«.

# Kæruviðgerð av fyritíðarpensjónum úr Danmark til Føroya

TÍÐINDASKRIV

Landsstýrismaðurin í almannamálum, Páll á Reynatúgvu, hevur tikið avgerð um at flyta kæruviðgerðina av fyritíðarpensjónum frá "Den Sociale Ankestyrelse" til Kærunevndina í almannamálum undir Føroya Kærustovni.

Upprunaliga var ætlanin, at øll kæruviðgerð í sambandi við ta nýggju almannapensjónslógina, sum kom 1. januar 2000, skuldi fara fram í Føroyum. Men tá var Føroya Kærustovnur rættiliga nýggjur, og avgjørt varð, at kæruviðgerðin um avgerðir viðvíkjandi fyritíðarpensjón varð verandi í Danmark – í "Den Sociale Ankestyrelse". Nú hevur Føroya Kærustovnur boðað frá, at tey meta seg vera før fyri eisini at yvirtaka hesa kæruviðgerð.

"At tann føroyski kærustovnurin nú hevur funnið stevið í arbeiðinum at viðgera kærur er eitt framstig fyri ta føroysku fyrisitingina", sigur Páll á Reynatúgvu, landsstýrismaðurin í almannamálum. "Almannapensjónslógin er ein føroysk lóg, og stórir partar av almannaøkinum eru yvirtiknir. Tí er tað ein gongd leið, at vit eisini yvirtaka kæruviðgerðir", heldur landsstýrismaðurin.

Almannamálaráðið hevur ta seinastu tíðina arbeitt við at flyta hendan kærumyndugleika frá tí danska stovninum til Kærunevndina í almannamálum. Hetta arbeiðið er nú liðugt, og avgerðir, sum fella aftaná 1. februar 2003, skulu sostatt kærast til Kærunevndina í almannamálum stendur í tíðindaskrivi frá Almannaráðnum, undirritað av Páll á Reynatúgvu, landsstýrismanni.

# Kunningarfundur um hægri útbúgvingar uttanfyri Føroyará Føroya Handilsskúla í Tórshavn

TÍÐINASKRIV

Mánadagin 10. februar kl. 20.00 bjóða MFS, LFÚ, Altjóða Skrivstovan og Føroya Handilsskúli til eitt útbúgvingarkvøld, í sambandi við at umsóknarfreistirnar til nógvar útbúgvingar í Danmark og øðrum londum nærkast.

MFS ferðast í hesum døgum runt til miðnámsskúlarnar og siga áhugaðum frá um lestrarviðurskifti uttanlands. Umboðini frá MFS-ráðnum eru Guðrið Weihe og Annika Helgadóttir Joensen, sum lesa stjórnmálafrøði ávikavist sálarfrøði við Lærda Háskúlan í Keypmannahavn. Tær greiða serliga frá um hægri útbúgvingar í Danmark, og harumframt um ymisk fíggjarlig, sosial og praktisk viðurskifti í sambandi við lesturin. Upplýsingar um MFS eru at finna á heimasíðuni: www.mfs.fo.

Holger Arnbjerg frá Altjóða Skrivstovuni tekur eisini lut í lestrarvegleiðingini. Hann fer at kunna um víðari lestur uttanfyri Danmark.

Dia Midjord, sum hevur journalistútbúgving frá Noregi, Anna Elisabeth Iversen, MA í sálarfrøði frá Lærda Háskúlanum í Edinburgh, Dan Winther, MA í heimsspeki og sálarfrøði frá Lærda Háskúlanum í Glasgow og Kitty May Ellefsen, m.a. Master of Law frá Lærda Háskúlanum í Aberdeen, siga stutt frá um royndir teirra við lestur uttanlands.

Harumframt koma umboð frá ymsum lærustovnum, sum handilsskúlin samstarvar við:

HIBU, Hønefoss í Noregi, ein læraraskúli fyri miðnámsskúlar

BI, Stavanger í Noregi, handilsháskúli m.a. viðvíkjandi oljuvinnu

The Robert Gordon University, Aberdeen

Tietgenskolen, Odense, m.a. handilsháskúlaútbúgvingar

Eftir hesar stuttu framløgurnar verður høvi hjá áhugaðum at seta fram spurningar um viðkomandi útbúgvingar. Hetta fer fram í smærri bólkum, har tað ber til at hoyra meira um serligar útbúgvingar og lestrarviðurskifti annars.

Lestrarvegleiðarar frá miðnámsskúlunum verða eisini at hitta, um fólk hava spurningar um útbúgvingar annars.

Øll, sum hava áhuga í hægri útbúgvingum, eru hjartaliga vælkomin.

Tíðindaskrivið er undirskrivað av MFS, LFÚ, ASK og Føroya Handilsskúla.

# Grót skipar fyri skeiði í live-ljóði

TÍÐINADASKRIV

Hósdagin 6. februar skipar Tónleikasamtakið Grót fyri grundskeiði í live-ljóði. Komið verður inn á grundliggjandi ting innan live ljoð, so sum: Equalizering, mikrofon teknikkur, compressarar og effektir og brúk av mixara. Skeiðið vendir sær til øll, ið gjarna vilja hava nakað av grundvitan innan hesi evni, nýbyrjarar eins væl og tey, sum hava fingist við ljóð, men sum sakna nakað av grundliggjandi ástøðiligari vitan um tey ymsu amboðini.

Skeiðleiðari er Jan Zachariassen og skeiðið verður hósdagin 6 Febr. í Losjuni í Gøtu kl 19.00. Kostnaðurin er 200 Kr. Og áhugað kunnu tekna seg á tlf 22 55 37